Álit

í

løgtingsmáli nr. 40/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av punktgjøldum á brennievni og broyting av heiti)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 3. november 2023, og eftir 1. viðgerð 7. november 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 9., 13., 16. og 30. november og 6. desember 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Samtak, Føroya Fiskimannafelag og Maskinmeistarafelagið, Áhugafelagið Antares, Landsfelag pensjónista, Reiðarafelagið, Skipara- og navigatørfelagið, Vinnuhúsið, Magn og Effo, Búskaparráðið, Landsbankan og í tveimum umførum landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, seinnu ferð saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) heldur tað vera neyðugt at lækka skattatrýstið á lág- og miðallønir á seinast vunnu krónu, so at tað m.a. betur skal loysa seg at arbeiða fulla tíð. Síðstu nógvu árini er skattabyrðan flutt frá avgjøldum til skatt á lønarinntøku, og meirilutin tekur undir við yvirskipaðu ætlanini at flyta ein part av skattabyrðuni av inntøkuskatti og yvir aftur á avgjøld. Hetta uppskotið snýr seg um at hækka punktgjøldini á bensin og diesel sum liður í fíggingini av skattalættanum 2024 – 2028.

Eftir galdandi lóg eru punktgjøldini 2,40 kr. pr. ltr. á bensin og 0,50 kr. pr. ltr. á diesel.

Við hesum lógaruppskoti hækkar:

- punktgjaldið á bensin frá 2,40 kr. pr. ltr. til 3,00 kr. pr. ltr. frá 2024
- punktgjaldið á diesel frá 0,50 kr. pr. ltr. til 1,10 kr. pr. ltr. frá 2024.

Bæði gjøldini verða sostatt hækkað við 60 oyrum fyri liturin.

Undir hoyringunum er komið fram, at lógaruppskotið fer at hava neiliga ávirkan á húsarhald og vinnufyritøkur fíggjarliga, og í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður eisini gjørt vart við, at tað verður dýrari fyri vinnuna, eins og hetta eru avgjøld á borgarar í sambandi við nýtslu.

Nýtslugjøldini fara í sjálvum sær at tyngja fíggjarætlanina hjá húskjum heldur meira enn við galdandi gjøldum, men til hetta er at siga, at skattalættin, sum lógaruppskotið er partur av, vigar væl upp ímóti hækkaðu gjøldunum fyri flestallar inntøkubólkar. Í fylgiskjalinum frá Fíggjarmálaráðnum verða dømi tikin um húski, sum nýta bensinbil, dieselbil ella el-bil og oljufýr ella hitapumpu – við lágari og høgari nýtslu. Metingin vísir, at alt eftir hvussu orkunýtslan er, verður nakað dýrari at liva, tá gjøldini hækka. Fyri flestu húski verður roknað við, at nýtslan hækkar um 200 kr. um mánaðin, sum er væl minni enn roknaði skattalættin hjá flestu húskjum.

Fyri tey við heilt lágum inntøkum, sum fáa avmarkaðan lut í skattalættanum, tí tey frammanundan gjalda so lítlan landsskatt, men sum tó verða rakt av hækkaðu avgjøldunum, verður møguligt at søkja um eitt orkuískoyti à kr. 5.000, og hetta vigar væl upp ímóti hækkaðu avgjøldunum, sum øll verða fevnd av.

Fyri vinnufyritøkur gera hækkaðu avgjøldini uttan iva mun og kunnu ávirka prís á vørum og tænastum, og endabrúkarin fer helst at uppliva eina ávísa hækking, men eitt av endamálunum við skattaumskipanini er júst at flyta skattatrýst frá lønarinntøkum til gjøld og annars at spjaða samlaðu skattabyrðuna. Í hesum sambandi má vinnuligi geirin eisini bera ein part.

Afturat hesum kann eitt úrslit av lógaruppskotinum gerast ein minkandi nýtsla av brennievni til bilin – bæði tí húsarhald og vinna fara at tálma nýtslu sína vegna hesa dýrkan, men eisini kunnu hugsast at fara at leggja um til grønari orkuloysnir. Tí verður uppskotið mett at fáa jaliga ávirkan á umhvørvið.

Lógaruppskotið er partur av fíggingarleistinum til tann ætlaða skattalættan hjá landsstýrinum, sum verður givin í tveimum, nevniliga við 100 mió. kr. í 2024 og 100 mió. kr. í 2025. Og gjøldini á diesel og bensin verða hækkað í 2024 sum ein týdningarmikil liður í tí fyrra partinum av lættanum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Lógaruppskotið er liður í eini skattaumskipan hjá landsstýrinum. Endamálið við lógini er at fáa pening til vegar at fíggja skattaumskipanina.

Ætlanin við hesum lógaruppskotinum er at hækka punktgjaldið á bensin frá 2,40 kr. pr. ltr. til 3,00 kr. pr. ltr. frá 2024 og at hækka punktgjaldið á diesel frá 0,50 kr. pr. ltr. til 1,10 kr. pr. ltr. frá 2024.

Við hesi broyting í punktgjaldinum væntast at fáa 27 mió. kr. eyka í landskassan.

Eyðsæð er, at við hesi broyting fara húsarhald og vinna at rinda meira, tí tað fer at verða dýrari at keypa bensin og diesel, og tí fer lógaruppskotið at hava neiligar fíggjarligar avleiðingar. Tað eru serliga pendlarar og tey, sum hava langt til arbeiðis, ið fara at merkja hækkaðu punktgjøldini.

Minnilutin vil vísa á, at øllum er greitt, at kostnaðarstøðið er hækkað munandi seinasta árið ella so. Alt er vorðið dýrari, og rentan er hækkað fleiri ferðir. Og sum steinur oman á byrðu kemur nú hetta lógaruppskotið, sum tyngir um hjá bæði vanliga húsarhaldinum og vinnuni.

Hesum førda politikkinum tekur minnilutin ikki undir við.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2023

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	